## DAGSINS MEINING

# Nakað nógv gjørt av

Mikudagur í hesi vikuni var ein álitisváttan hjá teimum, ið trúgva, at tað ber til at víðka føroyskt sjálvstýri innanfyri ríkisfelagsskapin, hóast fundurin milllum Høgna Hoydal og danska starvsbróðurin bert var ein av fleiri yvirtøkufundum, har hinir løgið nokk ikki hava fingi somu fjølmiðlaumtalu.

Varaløgmaður kallaði við vanligum lítillætni úrslitið av fundinum við Frank Jensen fyri eitt gjøgnumbrot. Valla man tað verða eitt gjøgnumbrot, at føroyingar kunnu yvirtaka ábyrgd av málsøkjum innanfyri ríkisfelagsskapin. Hetta hava vit kunnað tey seinastu meira enn 50 árini og koma at kunna hetta í nógv ár framyvir.

At varaløgmaður so, sum ikki einaferð, hevur eina aðra tulking av støðuni enn verðin annars, er sjálvsagt eitt sindur óheppið. Eisini er tað eitt sindur óheppið tá ráðharrar ikki eru vaksnir nokk til at koma við felags niðurstøðum frá fundum. Føroyingar, ið hava havt ein her av embætisfólki og øðrum at skriva littar bøkur og koma við greiningum av varierandi góðsku, áttu ikki at havt nakað ímóti, at embætismenn skulu hyggja at yvirtøkumálum.

Hvussu so víkir og vendir, so fáa vit nú einans eina løgtingssamtykt, ið væntandi verður broytt eftir næsta val. “Borðið fangar” og “nú ella aldrin” politikkurin hjá samgonguni hevur spælt fallit og fingu vit enn eitt prógv um hettar mikudagin í hesi vikuni.

Høgni Hoydal skal hava til rós, at hann ikki elvdi til rok og konfrontatión niðri á Christiansborg nú í vikuni – ikki enn í hvussu so er. Nú er bert eftir at vóna, at hann lærir av hesum úrsliti og ásannar, at tað ber til at víðka um føroyskt sjálvstýri innanfyri ríkisfelagsskapin. Ger hann tað, so er breiða semjan, sum allir flokkar kunnu taka undir við, næstan rokkin. Ger hann ikki tað, so má hann forklára føroya fólki, hvussu tað kann bera til, at tað ber til at fáa víðkað sjálvstýri uttan at hava stovnsett fullveldi. Hettar var jú ein av ivasomu niðurstøðunum í Hvítubók, nevniliga, at núverandi heimastýrislóg longu var í víðara lagi í mun til grundlógina, og tí var neyvan grundarlag fyri einari víðkaðari skipan innanfyri ríkisfelagsskapin. Veruleikin er, at tað sum ikki bar til sambært Hvítubók, vísir seg at verða tað einasta sum ber til!

Tað ber við hóvsemi til at víðka føroyskt sjálvstýri so langt sum vit ynskja tað innanfyri ríkisfelagsskapin. Formalistiska orðklúgvaríið, ið vit hava verið vitni til seinastu 3 árini, um at fullveldi er einasti vegurin fram, var so dyggiliga mótprógvað í farnu viku, og mátti onkur teoretikari sitið eftir við reyðum oyrum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fólkaatkvøðu fingu vit ikki, men løgtingsval fáa vit

**Flemming Mikkelsen**



Sum kunnugt varð lovað føroyingum ein fólkaatkvøða í sambandi við fullveldisætlanina. Men sum ikki einaferð leyp samgongan við løgmanni á odda frá givnum lyftum.

Yvirtøkulógin er vorðin veruleiki. Ferðast verður í pendulfarti millum landsstýrið og ríkisstýrið. Ein røð av yvirtøkum skal fremjast so ella so áðrenn 1. januar 2002. Tað vil siga við øðrum orðum, at um tríggjar mánaðar (um landsstýrið fær sín vilja), sita vit við yvirtøkum, sum vit als ikki kenna avleiðingarnar av.

**Palleba skal gjalda**
Samanlíknað við Postverk Føroya, hvørs yvirtøka hevur meira enn 25 ár á baki, so er vandi á ferð. Fullveldissamgongan er í døpurhuga, løgtingsval er fyri framman, nú má nakað henda á fullveldisleið — kostað hvat tað kostað vil.

Rokningina gjalda teir ikki sjálvir. Hon verður send til Palleba.

**Tvinnir kostir**
Fólkaatkvøðu fingu vit ikki, men løgtingsvalið fáa vit í seinasta lagi í apríl komandi.

Til løgtingsvalið hevur almenningurin høvið til at taka støðu fyri ella ímóti teirri fullveldisætlan, landsstýrið hevur spælt út við.

Kostirnir eru tvinnir: Ynskja tygum at Føroyar skulu staðfestast sum sjálvstýrandi tjóð í danska ríkinum, so skulu tygum atkvøða fyri Sambandsflokkinum til komandi løgtingsval.

Ynskja tygum, at Føroyar gerast fullveldi og sigla sín egna sjógv (ella reka fyri vág og vind), so skulu tygum atkvøða fyri einum av samgonguflokkunum, ella Miðflokkinum, sum stuðlar fullveldisætlanini við húð og hár.

# Tjóðveldið á Fólkating

**Johan Mortensen**



Fólkatingsvalið nærkast og Tjóðveldisflokkurin fer sjálvandi at stilla upp. Soleingi Ríkisfelagsskapinum er ein veruleiki fer Tjóðveldisflokkurin at gagn nýta demokratiska rætt okkara at senda umboð á Danating.

Tað er ongin ivi um at til hetta val fær Tjóðveldisflokkurin umboð á Fólkating.

Føroyingarnir á fólkatingi í brátt farna skeiði hava hvør í sínum lagi roynst ivingarsamir umboðsmenn hjá føroysku tjóðina. Tað er lætt at skilja at danir ivast í politiska álvarinum hjá føroyingum við slíkum umboðum sum lata persónlig áhugamál og avlagaða floks ideologi ganga framum løgtingssamtyktir og fólksins vilja.

Hvussu hesi Fólkatingsumboð annars hava røkt áhugamál okkara, td., við atliti til EU, altjóða handli og øðrum viðurskiftum hjá føroyskum vinnulívi hoyrist lítið til.

Stundin er komin til eina munandi broyting har Fólkatingið í alt størri mun skal gerast røðarapallur føroyinga.

Føroyingum og dønum tørva progressivar tjóðveldiskreftir á danatingi. Yvirhøvur skilja bæði danskir politikarir og danski almenningurin ynski okkara um ein sjálvberandi búskap og politiskt frælsi. Fyrsti munandi niðurskurðurin í blokkinum sum nú gerst veruleiki er eitt týdningarmikið stig framyvir sum eisini danir fegnast um. Hesin niðurskurður er Tjóðveldisflokkinum fyri at takka.

Hóast ríkisveitingin minkar framyvir so fer okkara vinnuliga samstarv við danir so sanniliga at halda áfram og vaksa. Dugnaliga danska vinnulívið og danskir vinnulívsmenn eru góðir samstarvspartnarir og tað stóra handilsliga samstarvið landanna millum er til stóran fyrimun fyri báðar partar. Eisini skal nevnast tað fyrimyndarliga sambandið millum tey stóru donsku reiðaríini og okkara sjófolk sum telist millum heimsins bestu.. Danir og Føroyingar hava tørv fyri hvørjum øðrum. Okkara samstarv kann økjast almikið á so nógvum økjum innan altjóða handil, IT vinnu, orku, gen-tøkni, ferðamannavinnu osfr.

Yvirhøvur hevur donsk og føroysk vinna altíð duga sera væl at samstarva uttan mun til politiska rákið og er tað kanska einahelst hjá leiðandi donskum vinnulívsmonnum tú sær størstu undirtøkuna og moralska stuðulin fyri føroyskum sjálvstýri og Republikkinaø

Okkara fullveldið er treytað av at vinnan samstarvar tvørturum øll landamørk Tað er tí mikið hugaligt at tað føroyska vinnulívið og einahelst okkara útflutningsvinna stuðlar fullveldinum og sær teir stóru møgulleikar hetta vil hava fyri vinnuna.

Danir yvirhøvur vilja hava ein greiða fullveldisrødd á teirra tingi sum greitt tosar áhugamál føroyinga. Kommercielt hugsandi, konstruktiv tjóðveldisfólk sum skoða framyvir og sum duga og tora at samstarva við danir. No more monkey-business.


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Fólkaflokkurin hevur mist trúvirði millum veljararnar

**Atli Hansen**



Tá ið politiskar meiningarkanningar hava verið gjørdar, hava okkara fjølmiðlar roynt at fáa viðmerkingar frá teimum ymisku politisku floksleiðarunum. Onkur fyri at forklára og onkur annar fyri at burturforklára.

Og soleiðis var eisini við tí kanningini, vit fingu nú um dagarnar. Men ein flokkur tykist at hava fingið meira enn trupult við at grundgeva fyri afturgongdini millum veljarnar. Tað tykist ikki vera nokk fyri Fólkaflokkin hesaferð at koma við tí vanliga svarinum um, at Fólkaflokkurin altíð stendur seg vánaligt í meiningarkanningum. Tað mugu eisini finnast aðrar forkláringar og løgmaður roynir alfaðirliga at vísa á, at teir settu spurningarnir eru ógreiðir og at fólk ikki eru heilt greið yvir, hvat tey hava svara upp á.

Og sum tað ikki var nokk at leggja Føroya fólk undir at vera tornom, so ekkóar Rúna Siovertsen sín formann við vaksandi styrki. Nú eru spurningarnir ikki bara ógreiðir, men teir eru eisini manipulerandi. Tað merkir m.a. villeiðandi.

**Spurningurin**
Tann einfaldi spurningurin, sum hvørt mansbarn í Føroyum tykist at skilja ljóðar soleiðis:

Ert tú fyri víðkaðum sjálvstýri innanfyri ríkisfelagsskapin og undir donsku grundlógini?

So einfaldur, at bert nøkur fá fólkafloksfólk ikki skilja hann.

Og so gevur Rúna Sivertsen okkum eina tulking av spurninginum, sum vísir, at hon hevur ikki skilt eitt vet av honum. Ella hevur hon tað og vil geva okkum eina villleiðandi frágreiðing um møguligar fylgir? Hon heldur lítið um evnini hjá Føroya fólki til at seta seg inn í politiskar spurningar.

Hoyr bara hvat Rúna Sivertsen kann fáa burtur úr hesum spurningi:

“Ein skipan undir donsku grundlógini merkir, at Føroyar gerast danskur landslutur”, sigur hon. Í Lov om Færøernes Hjemmestyre frá 1948 vera vit nevnd “et selvstyrende folkesamfund i det danske rige”. Vit eru eingin danskur landslutur.

Hetta skal so hava við sær, at vit frásiga okkum okkara tjóðskaparliga sjálvsavgerðarrætt. Fyri at kunna frásiga sær nakað, má man eisini hava tað. Í so máta verður helst eingin broyting.

Og vit missa rættin til evsta lóggávuvald í Føroyum, sigur Rúna Sivertsen. Hvønn lóggávurætt fara vit at missa? Vit hava evsta lóggávurætt á øllum yvirtiknum økjum. Og vit fara at missa rættin til at umboða okkum sjálvi, heldur Rúna Sivertsen áfram. Hvat er tað, vit fara at missa? Er tað rættin til at føra egnar fiskivinnusamráðingar?

Og vit fara at missa yvirvalds- og ognarrættin til alt tilfeingi sum t.d. olju og onnur møgulig ráevni í undirgrundini. Og tá ið tað er alt tilfeingi, so má tað eisini vera fiskin.

**Hava skilt spurningin**
Rúna Sivertsen - fylgir tú ongum við í? Avtalurnar um ráevni í undirgrundini - herundir oljan - hevur verið tugt og tanla í áravís og sum um tað ikki var nokk, so hava danski forsætisráðharrin og forrestin eisini teir flestu av andstøðuleiðarunum alment víst á, at undirgrundin er latin føroyingum til æviga ogn.

Og fyri at vísa á, hvussu lítið hon sjálv trýr sínum egnu orðum, vísir Rúna Sivertsen at enda til ein hulduserfrøðing sum sannleiksvitni.

Nei, trímenningurin. Her fert tú alvorliga skeiv. Føroyingar hava skilt spurningin, men vilja vísa tær og tínum, at tað, sum hetta landsstýrið hevur fingið eitt heilt valskeið at ganga við, ikki hevur undirtøku millum føroyingar. So einfalt er tað. Umleið helvtin av tykkara egnu veljarum og meira enn helvtin av øllum føroyskum veljarum taka ikki undir við tykkara arbeiði. Tað má vera hugstoytt.

Hetta má geva tykkum trúvirðistrupulleikar og harav fylgjandi forkláringstrupulleikar.

# Hugleiðingar um at stríðast ímóti terrorismu

**Niels Midjord**

Skelkandi var at síggja og hoyra tað, sum hendi í U.S.A. 11. september, men tað er kanska meira skelkandi, hvussu U.S.A. og NATO ætla at takla hetta og hvørjar fylgjur, tað fer at fáa.

Eisini er ivasamt, um ein statsmakt, sum vil kallast demokratisk, í hevnisøku kann loyva sær at likvidiera einstaklingar ella bólkar uttan rættarsókn og dóm; tí so undirgrevur hon statin, sum er ímynd av lóg og landaskili.

Í stríðnum millum ísraelsmenn og palestinar fylgja ísraelsmenn, sum vera mann tí, sum sagt varð við teir gomlu. Men við tað at teir eru sterkari enn palestinar, so taka teir ikki eyga fyri eyga og tonn fyri tonn, men heldur eini 6–7 eygu fyri eyga og 7 tenn fyri tonn. Ein skuldi trúð, at ein so fastur og harðrendur framferðarháttur fekk køvt allan ófrið, men tað er mótsatt; tiltøkini hjá ísraelsmonnum eru sum brenni á bálið, og ófriðurin veksur teimum upp um høvdið. Har afturat missa teir stuðulin uttanífrá, og á ráðstevnuni hjá ST um mannarættindini, sum varð hildin í Suðurafriku her fyri, rýmdu teir av fundinum saman við U.S.A., tí fleiri hond ákærdu teir fyri rasismu og fasismu, soleiðis sum teir bóru seg at ímóti palestinum.

Tá ið tú sært amerikanska forsetan tala um yvirgangsatsóknina, so er har eingin ivi at hóma og einki við at ganga í seg sjálvan; heldur er tað ein stoltur maður, sum veit, at hann ræður yvir heimsins sterkastu hermegi og sum er ótolin eftir at sleppa at brúka hana til at knúsa alla terrorismu, og tú fært varhugan av, at tað verður ikki eyga fyri eyga og tonn fyri tonn hesu ferð, men heldur 70 eygu fyri eyga og 70 tenn fyri tonn. Tað er frælsi, sum stríðist ímóti terrorismu, og tann, sum ikki er við U.S.A. í hesum bardaga, hann er við terroristunum.

Men að kann vera, at forsetin undirmetir tær kreftir, sum hann fær pískað upp, við at bera seg soleiðis at, at atgerðirnar hjá honum fara at geva eitt úrslit, ið er tað øvugta av tí, sum ætlanin var við teimum.

Um U.S.A. við allari sínari hermegi og øllum tí ríka partinum av heiminum í rygginum loypur á Afghanistan, sum er eitt av fátækastu londunum í heiminum, so verður hetta ímyndin av, hvussu tey ríku eirindaleyst og uttan fyrilit kúgva tey fátæku. Hetta kann fara at reisa vanliga fólkið í teimum fátæku londunum í samhuga og øði, og í hesum ljósinum gerast terroristarnir, sum framdu yvirgangsatsóknirnar í U.S.A. fyrimyndir og hetjur, sum við ongum vápnum megnaðu at raka bæði tað fíggjarliga og tað hernaðarliga hjartað í U.S.A. og leggja partar av teimum í oyði. Og tá er ikki óhugsandi, at yvirgangsatsóknirnar økjast so mikið nógv, at tær bert kunnu steðgast við politistatslíknandi lógum og atgerðum.

Citatið úr fjallataluni, sum sipað varð til omanfyri, ljóðar í síni heild: Tit hava hoyrt, at tað hevur verið sagt: »Eyga fyri eyga og tonn fyri tonn«; men eg sigi tykkum, at tit als ikki mugu seta tykkum upp ímóti tí illa«.

Um terrorálopið ikki verður hevnt, so fer tað fyri eftirtíðina at standa sum tann ræðuliga brotsgerðin, tað í veruleikanum var, ið kostaði ósekum fólki í túsundatali lívið, og sum øll, eisini viðhaldsfólk mugu venda sær burtur frá við andstygd.

Og um tey ríku londini vilja vinna á terrorismuni, so kann tað ivaleyst gerast ruddiligast og effektivast uttan vápn.

Heimurin kann býtast í ein ríkan part, sum gerst alt ríkari, og ein fátækan part, sum gerst at fátækari. Sum munurin millum partarnar báðar økist, økist eisini fólkaflytingin frá tí fátæka partinum til tann ríka, og sum fólkaflytingin økist, økist eisini fremmandahatrið. Øll hesi viðurskiftini skapa gróðrarbotnin fyri altjóða terrorismuni.

Um ríku londini høvdu tikið tráðin upp eftir Oluf Palme, sum stríddist fyri eini nýggjari fíggjarligari heimsskipan, har hvør einstakur heimsborgari skuldi fáa møguleika til at skapa sær eitt virðiligt lív heima hjá sær sjálvum, og um hetta hevði eydnast, so hevði fólkaflytingin fjarða burtur av sær sjálvum og fremmandahatrið við henni, og so hevði ikki longur verið nakar gróðrarbotnur fyri terrorismuni.


